Lívdin
- í lívd hins hægsta

Mars 2009



# Nýggi bygningurin



Týskvøldið 17. februar var fundur í hølunum hjá Lívdini á Brekku, har fíggjar- og byggibólkurin høvdu framløgu um gongdina í prosjekteringini og framtíðarætlanir við nýggja bygninginum hjá Lívdini.

Jógvan Zachariassen legði fyri og eggjaði samkomuni til at hava visiónir, sum bygningurin kann verða karmur um. Jóhan Syderbø kunnaði um prosjektmenningina og nýggjastu tekningarnar, umframt prosjektskipan, tíðarætlan, heildarkostnað, byggistig og útbjóðing. Regin Hammer kunnaði um fíggjargongdina í byggigrunninum higartil og framtíðar fíggjartørvin.

Ólavur Jøkladal leiddi fundin og eftir framløgurnar var høvi at seta spurningar. Stuðulsskjøl eru gjørd til fastar flytingar, og ætlanin er nú at gera eitt meira miðvíst arbeiði fyri at fáa fígging til vega.



## Samkoman skal vera viðkomandi

Eg elski samkomu Kristusar, og eg vil fegin geva eina góða og rætta mynd av, hvør samkoma Kristusar er, so at vit kunnu verða nýtt á tann hátt, sum Kristus vil nýta okkum. Samkoman er ikki ein avoldað losja, ið er týdningarleys og púra óviðkomandi fyri 21. aldar menniskjuna. Nei, samkoman er ein sunn, lívfør og virkin lívvera, sum Gud nýtir við kraft Heilaga Andans at útinna arbeiði Sítt á jørð, og tað er ein framíhjárættur at kunna vera við í hesum arbeiði. Samkoman skal vera viðkomandi, umbroytandi og kollveltandi fyri 21. aldar menniskjuna. Latið okkum tí verja einleika andans í bandi friðarins (Ef. 4:3).



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

### Jógvan Brøðraberg 60 ár

Leygardagin 21. februar fylti Jógvan Brøðraberg í Hoyvík 60 ár. Jógvan er føddur á Eiði og búði har barnaárini, til hann umleið 16 ára gamal flutti til Havnar at búgva og arbeiða.

Hann arbeiddi ymsastaðni tey fyrstu árini, men síðan 1969 hevur hann arbeitt á verkstaðnum Vón, og tað dámar honum væl.

Honum dámar væl at koma til møtir og í kirkju, serliga har ung savnast um tað andaliga. Eisini dámar honum sera væl at koma til legur, bæði í Zarepta og Nesvík.

At ferðast uttanlands við teimum á Mýrini, sum hann býr saman við, dámar honum eisini sera væl, og er hetta nakað, tey ofta gera. Jógvan er kreativur og fæst t.d við málningalist í kvøldskúlanum og hevur nógv onnur áhugamál.



Vit ynskja Jógvani hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

### Alterna næmingar vitja

Í sambandi við at næmingar á danska bíbliuskúlanum Alterna í Mariager koma til Føroya at vitja frá 14. til 21. mai í ár, er tørvur á fólki, sum kunnu hýsa teimum hesar dagar.

Talan er um umleið 70 fólk, sum eru við í ferðalagnum. Minst tveir næmingar skulu vera í húsi saman, og familjan, ið næmingarnir búgva hjá, skal syrgja fyri, at teir fáa morgunmat hvønn morgun og kanska onkran nátturða ein ella tveir av døgunum.

Áhugað kunnu ringja til Gunnvá í Liða tel. 262285 ella mail: gunnva_14@hotmail.com

Eisini er ein listi at tekna seg á á kunningarborðinum hjá Lívdini í skúlanum hvønn sunnudag.

Heimasíðan: www.alterna.nu

### Tillukku við barninum

24. januar fingu Sigrid og Mikkjal Thomassen í Hoyvik ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4.325 gr.



### Mammubólkur á Brekku

Annanhvønn fríggjadag kl.10.30 savnast mammubólkur í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík. Allar mammur við smáum børnum eru vælkomnar.

Er okkurt at spyrja um, eru tit vælkomnar at ringja til Súsonnu Joensen á tel. 319899.

### Hús til leigu

Eini nýggj hús eru bíliga til leigu á Oyri. Húsini eru í trimum hæddum, har tvær hæddir (130 fermetrar) eru innrættaðar. Áhugað kunnu venda sær til tel. 280028.

## Ársveitslan

Leygarkvøldið 31. januar 2009 varð ársveitslan hjá Lívdini hildin í Oasuni í Hoyvík. Hetta var eitt sera hugnaligt kvøld við nógvum undirhaldi, spølum og skemti. Her eru nakrar myndir frá veitsluni, sum Tórvør Wang hevur tikið.










# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

| | |
|---|---|
| 3. mars: | Prát um hvat vit lærdu av taluni sunnudagin / bønarløta |
| 10. mars: | Dópsskeið |
| 17. mars: | Húsbólkar |
| 24. mars: | Trúboðaravirki á Filipsoyggjunum (Anja Nielsen) |
| 31. mars: | Ungdómsarbeiði og mission í Zambia (David Lukama) |

## Lívdin til Zarepta

Samkomulega hjá Lívdini verður á Zarepta vikuskiftið 13.- 15. mars 2009. Heitið á leguni er "Vit skulu gera okkum til reiðar og byggja (Neh. 2:18) - Karmurin um mál okkara".

Kostnaðurin fyri leguna er: Fult legugjald: Vaksin kr. 400,- Hjún kr. 650,- Børn (2-14 ár) kr. 150,- Ung (15-17 ár) kr. 250,-. Bert leygardag: Vaksin kr. 150,- Hjún kr. 250,- Børn (2-14 ár) kr.




50,- Ung (15-17 ár) kr. 100,-.

Gevið gætur, at tekning fer fram eftir "først til mølle", og at rindan av legugjaldi á kontu nr. 9181 1705905 er = tilmelding. Tað merkir, at tekning er ikki gildug, fyrr enn legugjald er goldið.

Seinasta freist at tekna seg er 9. mars 2009. Tá legugjald verður rindað, skal navn og eftirnavn á øllum, sum rindað verður fyri, verða viðmerkt. Eru ivamál ella spurningar, kanst tú seta teg í samband við Jóhan Syderbø á tel. 210818 ella á mail adressuni: jori@post.olivant.fo

### PREP-skeið í september

Vikuskiftið 18.–20. september 2009 skipar samkoman Lívdin fyri PREP- skeiði, sum er fyri øll, ið vilja fáa íblástur og vegleiðing at samskifta og at liva saman sum hjún.

Byrjað verður fríggjakvøld við náttúrða, og endað verður sunnudag seinnapart. Tit skulu ikki hugsa um matgerð, uppvask, avrudding, arbeiði ella børn. Tit skulu bert hugsa um tykkum sjálvi!

Talan er um eitt lætt og stuttligt skeið, har skift verður millum undirvísing, venjingar og hugna. Skeiðið byggir á vísindaligar kanningar við pørum gjøgnum 30 ár. Undirvísarar eru Unn og Jógvan Zachariassen og Durita og Pauli Djurholm.

Skeiðið verður á Hotel Norð og kostnaðurin er 3.400 krónur fyri parið við gisting, fullum kosti og undirvísingartilfari. Tilmelding fer fram hjá Paula og Duritu Djurholm á telduposti

prep@livdin.fo ella tlf 316099. Pláss er fyri 13 pørum.

## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 1. mars

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Børn*
*Talari: Poul Guttesen*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið 11: 1-36*
*Talari: Jógvan Zachariassen*


Poul

### Sunnudagin 8. mars

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Vitnisburðir/opið evni*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Nehemias - Visiónir*
*Talarar: Leiðslan*


Jógvan

### Sunnudagin 15. mars

Einki møti: Lívdin á Zarepta

### Sunnudagin 22. mars

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Kvinnur í Bibliuni*
*Talari: Beinta Áargarð*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið 12: 1-8*
*Talari: Jógvan Zachariassen*


Beinta

### Sunnudagin 29. mars

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Børn*
*Talari: Jens Wang*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið 12: 9-21*
*Talari: Jógvan Zachariassen*


Jens

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*